# TB gjørdi einki við Mjølnir

**Flogbóltur:** Hesaferð eydnaðist ikki TB at gera nakað við meistaraliðið úr Mjølnir, sum vann greitt 2-0, og við tí er seinasta orðið sagt um einasta ósigur hjá Mjølnir í ár



**TB megnaði ikki at endurtaka bragdið frá fyrsta umfarinum, tá Mjølnir um vikuskiftið var á vitjan**
Mynd: Áki Bertholdsen

SVEINUR TRÓNDARSON

**TB-Mjølnir 0-2**

Skuldi nakar steðga Mjølnir á veg móti meistaraheitinum, so skuldi tað verða TB. Tvørágenturnar hava víst seg at vera tær stinnastu í kappingini móti klaksvíkskvinnum í ár, men hóast tað, so var tað ikki nóg mikið til sigurin í høllini í Trongisvági sunnudagin.

### Eingin mótstøða
Í veruleikanum er tað ein løgin støða at standa í hjá klaksvíkskvinnum. Tær vinna og vinna, og um tær eru fullmannaðar ella ikki — ja, tað kann fyri so vítt vera líkamikið.

Tær hava eisini mist fólk í ár, men tað sæst verri enn so líka væl á spælinum, sum tað ger hjá hinum liðunum. Tær fáa onga mótstøðu kortini. Tí má júst styrkin hjá Mjølnir vera tekin um, at tað eru Mjølnirkvinnurnar, sum gera tingini á rættan hátt, meðan hini feløgini ikki gera tað.



**Mjølnir hava nú vunnið sær Føroyameistaraheitið fyri 2000**
Mynd: Áki Bertholdsen

Seinastu tvey árini hevur Mjølnir verið so langt frammanfyri hini liðini, at tað ongantíð hevur verið veruligur spenningur í kappingini og vit kunnu í grundini spyrja um Mjølnir fær nakra mótstøðu yvirhøvur.

### TB enn best fyri
Tá tosast skal um silvurmerkini, so fingu tvørágentur eina gávu av Kambsdali fríggjakvøldið. Dráttur kundi við sigri á ÍF koma ájavnt við TB í stigum, men ÍF-kvinnurnar syrgdu fyri, at tað varð av ongum.

Tí liggur TB enn best fyri at fáa silvurmerkini í landskappingini. Og tá samanumkemur, er tað ikki órættvíst, um tað verður endin. TB hevur — um ikki víst besta spælið, so fingið mest burtur úr tí, tær hava víst.

Og tað er eisini ein góður eginleiki at hava ...

# Fram vann á SÍ

**Flogbóltur:** Fram syrgdi við 2-1 sigri á SÍ fyri, at spenningur enn er um silvurmerkini í mansdeildini. Men lætt var tað kortini ikki

SVEINUR TRÓNDARSON

**Fram-SÍ 2-1**

Fyrr í hesum kappingarárinum tók SÍ alt og øll á bóli við at leggja seg á annað plássi í landskappingini. Tað gjørdu teir m. a. við at vinna á Fram í Havn. Tá hendi tað seg meiri enn so, at sørvingarnir vóru hepnir, men tað vóru teir ikki leygardagin, tá sørvingarnir vóru í Havn og hittu Fram.

### Byrjaðu betur
Tað vóru sørvingarnir, sum byrjaður dystin best. Teir hálaðu tey bæði fyrstu settini til høldar, og vóru tí á odda í hálvleikinum. Men tað er nú ikki so løgið kortini, tí tá sørvingar fáa síni sterku vápn stillað inn, so er lítið at gera hjá mótstøðuliðunum.

Men tað krevur so eisini, at hugurin at spæla er til staðar, tí tað er hann ikki altíð.

Og tá hann ikki er tað, er spælið hjá sørvingum ov lætt at pilka sundur, og eydnast tað, eru teir ikki vandamiklir.

Um tað er tað, sum hendi í Havn um vikuskiftið skal vera ósagt, men veruleikin er, at tað stóð Fram á restini av dystinum.

### Teir halda seg framat
Í seinna hálvleiki var tað Fram sum setti dagsskránna, og tað hava teir allar orsøkir til. Kappingin um silvurmerkini er hørð, og ikki hava teir ráð til at tapa nakran dystin uttan at Mjølnir stríkur framum teir.

Hetta hava teir uttan iva havt í huga, tí tey bæði settini í seinna hálvleiki vann Fram, og so mátti seinasta settið eisini takast við, fyri at finna ein vinnara.

Her eydnaðist Fram at vinna 15-11 á SÍ og við tí vunnu teir dystin 2-1.

Sigurin hevur sum sagt við sær, at Fram hevur nøsina frammanfyri Mjølnir í dystinum um silvuri, og tað er lítið at ivast í, at teir vilja gera alt fyri at halda seg har.

### Stigatalvan óbroytt
Úrslitið av dystinum hava ikki nakra broyting við sær í stigatalvuni. Fram hevur nú tíggju stig á øðrum plássi í landskappingini og tað er seks stig færri enn Fleyr.

Sørvingar eru javnir við fuglfirðingar í stigum — bæði liðini hava trý stig — og tað verður millum hesi bæði liðini, at vit skulu finna aftasta liðið í kappingini.

Okkara skot er kortini, at SÍ fer at draga longra stráðið í tí dystinum, tí tá innanhýsis dysturin verður á skránni, hava sørvingar betru kortini. Men tað er okkara skot. Livst so spyrst ...

# ÍF ger um seg í botninum

**Flogbóltur:** Tað, sum næstan hendi seinast liðini hittust, hendi hesaferð. ÍF vann dystin móti Drátti 2-1 og er tí bert eitt stig aftanfyri hini liðini í botninum

SVEINUR TRÓNDARSON

**ÍF-Dráttur 2-1**

So eydnaðist tað. ÍF hevur verið so nær við fleiri ferðir í ár, men sum oftast hava tær kortini verið við undirlutan tá til stykkis kom. Men fríggjakvøldið eydnaðist tað fuglfjarðakvinnum at vinna dystin á Drátti.

Sum vit skrivaðu í leygardagsblaðnum, so var tað um reppið, at ÍF vann seinasta dystin, liðini spældu á Kambsdali, og tí vóru útlit til at dysturin fríggjakvøldið skuldi fara at gerast meira spennandi enn tey flestu roknaðu við — og so var.

### Tryggar í seinasta settinum
Tað var annars so, at liðini vunnu hvør sín hálvleik. Hetta er ikki óvanligt tá ÍF er annað liðið, men trupulleikin hjá ÍF hevur verið, at orkan ofta er gingin undan móti endanum av dystinum og so hevur tap verið í hendi.

Ikki tí, meiri enn einaferð hava tær verið óhepnar í avgerandi løtum, og tapt dystin soleiðis í staðin. Men tað er jú ein partur av flogbóltinum.

Men fríggjakvøldið vóru tær til dystin fús alla tíðina, og tá seinasta sett skuldi til fyri at finna ein vinnara av dystinum, tá vístu ÍF-kvinnurnar, at tað vóru tær, sum vóru betri fyri.

Tær gjørdu bart í seinasta javnbrótaranum og vunnu hann 15-11.

Við tí úrslitinum endaði dysturin við 2-1 sigri til ÍF, sum nú bert er eittans stigi aftanfyri Fleyr.

### Spell hjá Drátti
Hjá Drátti var tað haraftur-ímóti spell, at úrslitiðå gjørdist sum tað gjørdist.

Við einum sigri høvdu tær lagt seg undir liðina á TB, sum tapti móti Mjølnir og tað hevði styrkt munandi um teirra møguleikar at fáa silvur í ár.

Men so var ikki og tí mugu vágagenturnar rættuliga bróta upp ermar um tær skulu hava klørnar í silvurmerkini.

Men dysturin fríggjakvøldið er kanska ein góð mynd av árinum hjá Drátti. Tær hava verið ov ójavnar. Trupult hevur verið at funnið tað støðuga spælið, sum er neyðugt skalt tú gera teg galdandi í oddinum. Tær hava vunnið nógvar dystir, men tíverri fyri tær, hava tær tapt teir “skeivu dystirnar”.

Tað hava tær neyvan nakað í móti í Fuglafirði. Teimum var sigurin kærkomin ...



# Mjølnir gjørdi skjótt av

**Flogbóltur:** Mjølnir gav ikki ÍF møguleikan at endurtaka sigurin frá seinast liðini hittust á Kambsdali. Mjølnir vann greitt 2-0

SVEINUR TRÓNDARSON

**ÍF-Mjølnir 0-2**

Mjølnir vann ein greiðan 2-0 sigur á ÍF á Kambsdali fríggjakvøldið. Munurin millum fremra liðið — Mjølnir — og ÍF, sum liggur aftast, var ov stórur til at fuglfirðingar fingu nakað burtur úr yvirhøvur.

Mjølnir vann øll settini og fór tí yvir um aftur Leirvíksfjørð við báðum stigunum, sum eru so týdningarmikil í stríðnum um silvuri.

### Ikki annað væntandi
Tá samanum kemur, so var ikki annað úrslit væntandi undan dystinum.

Mjølnir hevur verið væl leikandi seinnu hevltina av hesum kappingarárinum, men teir hava eisini verið óhepnir til tíðir. Leikandi venjarin hevur sína góðu ávirkan, men aðrir leikarar eru eisini, sum geva liðnum breidd.

Mjølnir ger einki við fremsta plássi í deildini, men kann, um alt vil væl stinga nøsina framum um Fram, sum teir berjast við um annaðplássi í landskappingini.

Í so máta var dysturin fríggjakvøldið sera týdningarmikil fyri Mjølnir at vinna, tí eins og onnur lið, hava teir við hvørt lyndi til at slappa av, tá liðið teir leika ímóti er verri fyri enn teir sjálvir.

Sigurin hevði við sær, at Mjølnir heldur trýstið á Fram um annaðplássi. Havnarmenninir høvdu sítt at síggja til í Havn, har teir høvdu SÍ á vitjan.

### Bíða eftir sørvingum
Hjá ÍF er støðan tann, at teir eru ájavnir við sørvingar í stigatalvuni. Um ÍF skal gera sær vónir um at enda hægri enn SÍ, so skal dysturin móti SÍ, sum verður á Kambsdali seinni í ár, vinnast.

Vit vænta í hvussu er ikki, at ÍF fer at gera nakað við Fleyr ella Fram, so tað má verða í dystinum móti sørvingum, at stigini skulu fáast til høldar.

Livst so spyrst. Annars er bara at brynja seg til næsta kappingarár og vóna, at tað fer at hilnast betur enn hetta árið gjørdist.



**Hetta kappingarárið hevur ikki gingist so væl hjá Fuglfirðingum, og um vikuskiftið vóru teir aftur við undirlutan**

# Ayr tapti

Føroyingarnir í Skotlandi taptu hetta vikuskiftið, og eru framvegis á sjeynda plássi

JÁKUP MØRK

Tað skarst einki serligt hjá føroyska liðnum í Skotlandi, Ayr United, tá teir leygardagin royndu seg á útivølli móti Falkirk, sum telist millum liðini, ið stríðast fyri uppflytan til Premier League.

Eittans mál kom í dystinum, og kom hetta eftir 16 minuttir, tá álopsmaður á mótstøðuliðnum var hægri enn málverjin hjá Ayr í einum luftdysti. Eftir bretsku bløðunum at døma, átti málverjin helst at hava tamarhald á bóltinum, so møguliga er Jens Martin farin at nærkast einum møguleika millum stengurnar.

### Ring líkindi
Annars fættist úr Skotlandi, at líkindini fyri at spæla fótbólt vóru út av lagi vánalig leygardagin. Vøllurin var mest átøkur einum stórum runudíki, men kortini fáa liðini bæði rós fyri, at tey alla tíðina royndu at spæla fótbólt:

Jens Kristian Hansen var millum teir 11 leikararnar, sum byrjaðu á vøllinum, men hann var skiftur út eftir bert 32 minuttum. Hin føroyingurin í felagnum, Jens Martin Knudsen, mátti eins og vanligt hyggja at dystinum frá áskoðaraplássunum.

Ayr liggur framvegis á sjeynda plássi á stigatalvuni, og sum so er ikki tað stóra eftir at spæla um hjá teimum. Eingin vandi er fyri niðurflyting, og hinvegin er ikki líkt til, at teir kunnu spæla við um uppflyting, og so er bert at fáa árið at ganga.

Komandi dystin fáa teir tó annað at hugsa um, tá Dundee, sum dagliga spælir í bestu deildini, kemur á vitjan. Talan er her um ein dyst í steypakappingini, og megnaði Ayr United at fáa javnleik í fyrra dystinum millum liðini bæði.

# Holte og HIK gjørdust steypavinnarar

**Flogbóltur:** Donsku steypafinalurnar í flogbólti vórðu leiktar sunnudagin, og tær endaðu við, at Holte vann hjá kvinnum, meðan HIK endurtók bragdið frá í fjør

SVEINUR TRÓNDARSON

Donsku steypafinalurnar í flogbólti vórðu leiktar sunnudagin. Einki av “føroysku“ liðunum høvdu spælt seg í finaluna, so teir føroyingarnir, sum ikki høvdu leitað sær í KB-høllina, kundu kasta seg afturá ístaðin.

Holte og DHG Odense høvdu spælt seg í kvinnufinaluna og havandi í hugað, at tað eru fremstu liðini í donsku landskappingini, sum DHG leiðir, so kundu áskoðararnir vænta sær eina spennandi finalu. Men so varð ikki.

Holte var klárt tað betra liðið og vann ein ruddiligan 2-0 sigur og tí kunnu tær príða seg við heitinum danskir steypavinnarar 2000.

Settúrslitini vóru 26-24, 21-18, 21-15 og 21-11.

Sum tað sæst var bara spenningur í tí fyrsta settinum, sum endaði 26-24. Aftaná tað var tað so at siga bara tað eina liðið á vøllinum, og tað var meiri enn trupult hjá DHG at gera seg galdandi.

### HIK vann eitt sett
Hjá monnum varð talan um ein rættiligan gysara. Holte, sum tapti finaluna í fjør, vildi hava hevnd, og teir løgdu ógvuliga hart út. Teir vunnu eisini bæði tey fyrstu settini í fyrrra hálvleiki og tað fysta í seinna hálvleiki, so tað sá veruliga út til at fara at eydnast teimum at fáa hevnd fyri tapið í fjør.

Men so kom stígur í. HIK kláraði at venda gongdini og vann fjórða sett, og tað gav Holtemanningini eitt sjokk, sum teir ikki komu seg eftir.

HIK Ålborg vann javnbrótaran um seinna hálvleik, og brádliga vóru tað teir, sum vóru betri fyri enn Holte.

Seinasta javnbrótaran — tann um dystin — vann HIK 15-7 og við honum eisini finaluna annað árið á rað.

Settúrslitini vóru annars 19-21, 15-21, 15-21, 21-15, 7-4, 15-7.

Sum tað sæst á settúrslitunum vann HIK steypafinaluna við bert at vinna eitt sett og síðani tveir javnbrótarar. Soleiðis kann verðin vera so løgin ...

Aftaná dystin varð Jonas Napier úr Holte valdur til besta leikara í finaluni hjá monnum meðan Mette Flügge, úr Holte, varð vald til besta leikara í kvinnufinaluni.

# Svumu í Klaksvík

Um vikuskifti skipaði svimjifelagið Ægir fyri svimjikapping í Klaksvík, har seks av teimum sjey svimjifeløgunum í landinum vóru umboðað

JÁKUP MØRK

Kappingin var fyri svimjarar, sum eru førddi í 1986 og eldri. Sum nevnt omanfyri, so vórðu seks av teimum shy svimjifeløgunum í landinum umboðað, og úr Klaksvík frætta vit, at fyrireikararnir vóru stak væl nøgdir við undirtøkuna.

### 13 ferð nr. 1
Sum heild gekk sera væl at avgreiða allar kappingarnar, og tá tað kom til stykkis, var støðan tann, at Havnar Svimjifelag hevði vunnið ikki færri enn 33 av greinunum, sum kappast varð í.

Stóri medaljuslúkurin var tó ikki úr Havnini, men var tað í staðin Kristian Olsen úr lokala svimjifelagnum. Klaksvíkingurin vann ikki færri enn 13 kappingar, so einki er at ivast í, at svimjievnini eru á einari leið.

Svimjarin við næst flestu heiðursmerkjunum kom eisini úr Klaksvíkini, og var tað Bára Joensen, sum sjey ferðir var fyrst at nerta við kantin á svimjihylinum.

Endaliga býti av fyrstaplássum varð annars sum víst niðanfyri:

Kristian Olsen, Ægir, 13
Bára Joensen , Ægir, 7
Andrass Thomsen, HS, 4
Rannvá Jacobsen, HS, 4
Kristoffur Hentze,HS, 4
Cecilia N. Poulsen, TS, 3
Charlotta Venned, Ægir, 3
Karin Gaardlykke, HS, 3
Jóhan Martin Poulsen, FLOT, 2
Jóannes À Fløtti, HS, 1
Bogi Lenvig, HS, 1
Annika Jacobsen, HS, 1
Janus Olsen, HS, 1
Frits Eið, Skeggjar, 1
Jóannes Jóhannesen, HS, 1
Katrin Sørensen, HS, 1
Johan Joensen, HS, 1
Alice Sørensen, HS, 1
Ulrik á Hjøllum, FLOT, 1
Stafettir:
Havnar Svimjifelag, 8

Næstu ferð at kappast verður í svimjing norðuri í Klaksvík verður vikuskiftið frá 31. mars til 2. apríl. Tá stendur kappingin um smáunglinga meistaraheitið á skránni, og er tað Svimjisamband Føroya, sum skipar fyri hesi kapping.



**Kristian Olsen úr Ægir gjørdi bart um vikuskiftið, og vann ikki færri enn 13 kappingaar**
Mynd: SáH